


# Standmynd av Maritu

Danmark eru kvinnur, sum arbeiddu fyri kvinnusakini hetjur. Eg var í føðingardegi hjá systir mínari í Keypmannahavn seinasta vikuskifti. Tá vit skuldu fara heimaftur, fóru vit av høvuðsjarnbreytarstøðini og út í Kastrup við toki. Á tí eina vegginum í tokinum var ein søga um eina av fyrstu kvinnusakskvinnunum í Danmark. Hon hevði skrivað fyrstu bókina um korini hjá kvinnun í danska samfelagnum.
Hóast bókin einans gjørdi vart við viðurskifti, sum eru sjálvsøgd í dag, misti hon arbeiði sum lærari og var útstoytt av samfelagnum og doyði undir ússaligum korum. Henda kvinna verður heiðrað sum ein hetja av danska samfelagnum ídag. Av monnum eins og kvinnum.
Eg gleði meg til tann dag, tá vit í Føroyum á sama hátt fara at heiðra tær kvinnur, sum vit kalla reyðsokkar. Tí tær hava veruliga gjørt eitt stórt arbeiði fyri okkum eftirkomarar. Fyri okkum kunnu nøkur av teirra mátum at gera tingini uppá sínast lítið feminin, og vit kunnu flenna eftir onkrum av tí tær gjørdu. Men veruleikin er, at tær millum annað gjørdu, at tað í dag er "lógligt" at ganga ílatin júst, sum vit hava hug til. Bara hesin lítli veruleiki er merkiligur at hugsa um í dag.
So má eg leggja dent á eitt afturat. Mínar royndir eru, at menn hava tikið líka væl undir við kvinnuligum politikarum sum kvinnur. Bara fyri at taka meg sjálva sum dømi: Nakrir av mínum bestu stuðlum eru menn. Fyri mær eru kvinnusakskvinnur líka stórar hetjur sum Nólsoyar Páll og Jóanes Paturson. So eg fari at skjóta upp, at Tórshavnar Kommuna reisir eina standmynd einari kvinnu, sum skal standa á góðum plássi í Havnini.
Taka vit standmyndirnar sum standa í Havnini í dag, so er eingin navngivin kvinna millum standmyndirnar. Hinvegin eru fleiri standmyndir av navngivnum monnum: Nólsoyar Páll, R.C.Effersøe, Hans Andrias Djurhuus, Rasmuss Rasmussen, Símuni av Skarði, William Heinesen og nú kemur skjótt eisini ein av Sigmundi Brestirsoni. So nú er tíðin komin at ein navngivin kvinna fær pláss teirra millum. Eg skjóti upp, at tað verður Marita Petersen.






